HEILSUMÁLARÁÐIÐ

Trivnaðarnevndin

Dagfesting: 30-10-2020
Mál nr.: 20/00826-25

Viðvíkjandi LM-037/2020 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógini)

Landsstýrismaðurin í heilsumálum vil hervið boða Trivnaðarnevndini frá, at hann mælir til, at hildið verður fast við núverandi tilskotsstiga í § 18, stk. 3 í heilsutrygdarlógini. Broytingaruppskotið til heilsutrygdarlógina, sum varð lagt fram í sambandi við fíggjarlógaruppskotið 2021, var annars at strika stig í tilskotsstiganum, og at broyta upphæddirnar fyri nær tilskot verður veitt. Galdandi tilskotsstigi hevur fimm stig fyri persónar í aldrinum 18 til 67 ár, og fýra stig fyri 67+ ár og fyritíðarpensjónistar, sí niðanfyri:

18-67 ár	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-5553	75%
5553-	100%
Gjald 2121,50	

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-524	0%
524-1047	40%
1047-2095	60%
2095-2493	75%
2493-	100%
Gjald 1356,50	

Tann ætlaða broytingin í uppskotinum hevur fýra stig fyri persónar í aldrinum 18 til 67 ár, og trý stig fyri 67+ ár og fyritíðarpensjónistar, sí niðanfyri:

18-67 ár	
0-1500	0%
1500-3000	35%
3000-6000	55%
6000-	100%
Gjald 3825,00	

67 + ár og fyritíðarpensjónistar	
0-1500	0%
1500-2000	35%
2000-	100%
Gjald 1825,00	

Soleiðis verður mælt til at halda fast við galdandi tilskotsstiga í § 18, stk. 3 í galdandi heilsutrygdarlóg og strika ásetingina um at broyta tilskotstigan í broytingaruppskotinum.

Tað verður ikki mælt til at fremja aðrar broytingar í uppskotinum.

Heilsumálaráðið